# Mikkjal og Allan eru í finaluni

Teir báðir fyrstu luttakararnir í finaluni í karaokekappingini í Glitnir eru funnir. Tað vóru Allan Davidsen og Mikkjal Viderø, ið tryggjaðu sær finaluplássini.Fyrsta umfarið í karaokekappingini gekk sambært fyrireikarunum væl, og var sømuleiðis væl vitjað.

So fitt av fólki fylgdi við tá, luttakararnir sungu tveir sangir í part. Hetta vóru sangir, ið luttakararnir sjálvir høvdu valt.

Dómsnevndin við Áka G. Andreassen, Kenneth Djurhuus og Terja Djurhuus, hevði eina trupla uppgávu, tí sambært tíðindaskrivi frá Glitnir og Áka G. Andreassen var sera tætt millum luttakararnar: Allan Davidsen og Mikkjal Viderø høvdu tó munin á hinum fýra luttakarunum og vórðu sendir í finaluna. Enn truplari var at meta um hvør skuldi eiga sigurin.

- Munurin á teimum báðum var ikki stórur, báðir sungu framúr, og framførslurnar vóru eisini góðar, skrivar Áki.

Dómaratrioin kom tó eftir, at Mikkjal Viderø átti munin og vann fyrsta umfarið av karaoke kappingini. Mikkjal og Allan skulu kappast við fýra onnur í finaluni 1 desember um vikuskiftisferðina frá Atlantic Airways til Keypmannahavnar við uppihaldi á Hotel Hilton.

2. umfar í kappingini verður nú hóskvøldið. Tekning ferð fram hjá Kenneth á 504334 ella hjá Terja á 268889, ella við at støkka inn á gólvið í Glitnir.

-nud



*Banarnir sum bólkarnir kappaðust á stóðu lið um lið, so lætt var at fylgja við á øllum banunum í senn*



*Fleiri hundrað foreldur og avvarðandi vóru og fylgdu við kappingini*



*Bjarni Djurholm var eisini við sum dómari í kappingini*



*Jóannes Eidesgaard bæði finaluna har hann eisini var dómari*

til kappingina, so hevði hann eisini ábyrgdina av stigaskipanini í kappingini. Henda stigaskipan var ein skipan, sum føroysku liðini høvdu í felag við lið úr ellivu øðrum londum, og sum roknaði stigini hjá bólkunum út á eini felags stigatalvu á alnetinum, soleiðis at til bar at síggja, hvussu øll liðini stóðu seg í mun til hvørt annað.

Her var talan um lið úr Noreg, Danmark, Bretlandi, Hollandi og fleiri við teimum. Tá alt kom til alt vísti tað seg, at føroysku vinnararnir K.U.R.T endaðu sum nummar seks av øllum hesum liðunum.

Eitt sera flott úrslit, sum ongin hevði roknað við, og kanska ein ábending um, at føroyskir skúlanæmingar saktans kunnu standa seg millum aðrar skúlanæmingar í kappingum, hóast vit hava eina PISA-kanning, sum sigur okkurt annað.

## Til Svøríkis í desember

Klokkan fýra seinnapartin var ætlanin at tiltakið skuldi enda. Hetta dró eitt sindur út, men klokkan fimm var so alt leyst og liðugt. Seinkanin upp á ein tíma er tað einasta fyrireikararnir kunnu seta ein fingur á við tiltakinum. Annars gekk alt sum smurt, og bæði luttakarar og teir fleiri hundrað áskoðarar fingu undirhald og spenning fyri allar pengarnar leygardagin.

Samansetta liðið úr Argja- og Venjingarskúlanum vann kappingina, og skulu tí fyrst í desembermánaði til Västerås í Svøríki at umboða Føroyar í Skandinavisku finaluni í First Lego League.